# KUNNGERÐ NR. 54 FRÁ 9. JUNI 1989 UM TJALDING.

**Kunngerð nr. 54 frá 09.06.1989**

Broytingar eftir 1. januar 1999 og kunngerðir

Við heimild í § 4 og § 35, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd hevur landsstýrið ásett:

**§ 1.** Tjalding er bert loyvd, har nøktandi saniter viðurskifti - nátthús og vaskiumstøður - eru.

**§ 2.** Kommunurnar hava eftirlitið við, at tjalding einans fer fram á støðum, har treytirnar í § 1 eru loknar.

*Stk. 2.* Kommunurnar hava skyldu at seta upp uppsløg o.t. um, at tjalding ikki er loyvd á teimum støðum, har tilíkt vanliga kemur fyri og har treytirnar í § 1 ikki eru loknar.

**§ 3.** Brot á §§ 1 og 2 verða revsað við bót.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.